# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

**Føðingar**

25. mai fingu Beinta Anthoniussen og Sonnie Joensen, Toftir, ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 3800 gr.

31. mai fingu Maiken og Annfinn Dam, Norðskála, ein son. Hann var 50 cm. langur og vigaði 3100 gr.

1. juni fingu Marta og Harald Dam, Vágur, eina dóttur. Hon var 60 cm. long og vigaði 4860 gr.

2. juni fingu Anna Borg Dahl og John Eystberg, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 55 cm. long og vigaði 4000 gr.

2. juni fingu Louisa P. Jacobsen og Gunnar Johansen, Hoyvík, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 4000 gr.

3. juni fingu Herborg Líggjasardóttir Johannesen og Rúni Magnus Johannesen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3240 gr.

3. juni fingu Nikolina Jóhannessen og Hanus Gregersen, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 50 cm. long og vigaði 2950 gr.

5. juni fingu Anna Marita Pállson og Jens Andrias Vinther, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 58 cm. long og vigaði 4350 gr.

5. juni fingu Sóley og Jógvan Sigurd Hórðara, Vestmanna, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3950 gr.

6. juni fingu Elisabeth og Eiler Hansen, Leirvík, eina dóttur. Hon var 56 cm. long og vigaði 4600 gr.

7. juni fingu Elin Hammer og Jákup Vágsheyg, Runavík, eina dóttur. Hon var 50 cm. long og vigaði 3075 gr.

**Brúdleyp**

Leygardagin 10. juni kl. 15.00 giftast í Hvalvíkar kirkju Gunnvá Svartá, Hvalvík og Martin Wennerström, Tórshavn.

Leygardagin 10. juni giftast Unn Thomsen, Tórshavn og Andrija Ilic, Beograd. Brúdleypsadr.: Tadeusa Koscuskog 58, 2. hædd, íbúð 17, 11000 Beograd, Serbia.

Leygardagin 10. juni kl. 14.00 giftast í Betania í Porkeri Sigrid í Skemmuni og Gimme Andreasen.

Leygardagin 10. juni giftast Elsa Lamhauge, Søldarfjørður og Hugo Leo, Leirvík. Vígslan verður í Leirvíkar kirkju kl. 15.00 og veitslan verður í Bygdarhúsinum kl. 18.30 fyri innbodnum.

## Minningarorð um okkara góða pápa, abba og verfaðir Svenning Holm Lindenskov, vitapassara, Nólsoy

### føddur 25. 07. 36 - deyður 07. 02. 06



Sum ein gøta í greið er at ganga eftir, sum ein varði í stinnur stendur og sum ein viti ið lýsir bjart, so einki ilt skal berast á. Soleiðis kunna vit lýsa teg, góði babba.

Góði babba, abbi og verfaðir, hvat vit sakna teg nógv, vit sum sita so spyrjandi eftir. Tað vardi okkum ikki, at tú so brádliga var tikin frá okkum.

Altíð var tað so hugnaligt at koma út til Nólsoyar at vitja teg og mammu. Og síðstu jól og nýggjár, vit øll vóru har, hugsaðu vit ikki at hetta var tín síðsta høgtíð saman við okkum.

Altíð hevur tú verið har fyri okkum, altíð klárur at hjálpa, tá á stóð, greiður í tínum tingum, alt skuldi verða í ordan. Men góði babba, her á fold skulu vit ikki verða verandi og nú var tín fjørður rógvin. Sjúkan plágaði teg so nógv tað síðstu tíðina, og tú orkaði ikki meir. Tú visti hvønn veg tað bar og var ikki óttafullur. Tú visti, tú skuldi til ein betri stað og møta tí Guði tú hevði sett títt álit á her á foldum. Gott er at vita, at ein dag møtast vit aftur har eingin sorg og sjúka er.

Tú starvaðist nógv ár á Borðuni, fyrst sum postmaður, síðani sum vitapassari, og fekk tú eisini tann heiður at fáa »Tjenestemedalje«. Tá tú var spurdur, um tú mintist ávísar hendingar, svaraði tú altíð at "tá var eg á Borðuni". Tað sigur nógv um, hvussu trúfastur tú var við arbeiðspláss títt. Mangan vóru vit bangnar, tá tú í myrkri og vindi einsamallur kom til gongu heim eftir oynni. Vit stóðu og hugdu út á oynna, um vit ikki sóu ljósi frá lyktini, tá tú kom oman av oynni. Tá ein ljósglæma hómaðist, vóru vit glaðar, tí nú kundu vit fylgja við, so hvørt tú nærkaðist bygdini. Tá tú so hoyrdist í kjallaranum var gleðin enn størri, tí nú var tú heima aftur hjá okkum.

At koma í Guds hús dámdi tær sera væl. Í nógv ár var tú klokkari í kirkjuni, eisini var tú í nógv ár í kirkjuráðnum, hetta vóru eisini álitisstørv, sum tú vardi um til fulnar.

At verða úti í náttúruni dámdi tær sera væl. Dámdi so væl at práta við fólk, visti nógv um alt, hevði gott innlit í føroyskum og útlendskum viðurskiftum. Fekk heimaskiparaprógv og sigldi nógv í ungum døgum við nógvum góðum monnum. Stuttligt at hoyra teg práta við fólk um tað og serliga tá tú so hitti onkran av teimum aftur.

Tú lærdi okkum nógv, at vit skuldu hava ordan í okkara tingum, vera álítandi og passa alt okkara væl, tú var glaður tá vit báðar yngru fingu prógv í vetur. Lærdi okkum allar nógv um veður, nær tað var best at sigla og hvussu ættirnar og sjóvarfalli var á fjørðinum.

Seyðurin ikki at gloyma, hann treivst væl í tínum hondum. Eplir at velta, alt var uppá sítt pláss. Ein álitismaður var tú, dugdi væl til hendurnar. Visti nógv góð fiskimið, kom altíð heim av útróðri við nógvum fiski, greiddi verstsyninum frá hvar var best at sigla, tit sótu altíð og prátaðu í stovuni um mangt og hvat, tað var altíð so hugnaligt at lurta, hvussu tú lærdi teir. Tú var ógvuliga góður við teir, hevði nógva virðing fyri tí teir gjørdu og teir virdu teg sera nógv, gott at teir kundu verða hjá tær tað síðstu tíðina.

Húsini á Ryggi, har er so hugnaligt, har dámdi tú sera væl. Gott, vit kundu verða við tær at gera tey í stand, tí tað vildi tú so gjarna.

Abbabørnini, tey var tú altíð klárur at geva eitt klemm og nógv góð orð á vegnum. Var glaður tá tær báðar elstu abbadøturnar fingu studentsprógv og tú kundi flagga fyri teimum, tað gleddi teg. Beiggin, tá hann kom, tá var tú ovurfegin, ja, hann skuldi eiga bátin, tað segði tú sama dag, hann var føddur. Uppkallaður, tað var ein stoltur abbi at síggja, tá beiggi var doyptur. 7 abbadøtur, tær var tú so góður við, tá tú hugagóður fór eftir einum oyra at geva teimum. Glaður var tú á Ríkissjúkrahúsinum, tá tú hoyrdi málið á abbabørnunum, tá kom smílið fram.

Teir seinastu dagarnir á ríkissjúkrahúsinum, var tú sera ússaligur, men tú vildi alla tíðina hava at vita um vit øll høvdu tað gott, um alt var sum tað skuldi verða. Gott at vit kundu verða hjá tær, hjálpa tær, sum tú so mangan hevur hjálpt okkum. Hav tað gott, tað segði tú altíð við okkum.

Góða mamma, tómligt er tað hjá tær nú, tú er vorðin einsamøll, men vit eru her fyri teg, sum vit lovaðu babba. Harrin styrki teg í hesi stóru sorg.

Mong og góð minnir eru um teg, góði babba. Tíni spor eftir tí greiðu gøtuni, sum møttu teimum stinnu varðunum og út til vitan í lýsti bjart, tey eru mong. Tey verða ikki stigin av tær meir, men tey eru har. Nøkur venda úteftir og nøkur venda heim ímóti heimbygd tíni. Alt goyma vit í okkara hjørtum, nú tú er farin heim til tað fagra land sum hesi vøkru ørindi siga:

*Hoyr nú, hitt fagra ljóð,*
*sólin rísur, morgun er,*
*dagarnir ganga, tíðin fer*
*lívið styttist, altíð á ferð.*

*Til eitt annað land, langt, langt burtur,*
*har er gleði, sorg fána burtur,*
*eingin grátur har er at hoyra,*
*bert gleðirómur fellur tær í oyra.*

*Tann dagur kemur tá vit øll skula fara,*
*burt í annan heim, gott skal tað verða,*
*har finna vit frið við hansara lið*
*og gleðitár fylgja tá við.*

*Til eitt annað land, langt, langt burtur,*
*har er gleði, sorg fána burtur,*
*eingin grátur har er at hoyra,*
*bert gleðirómur fellur tær í oyra.*

*Friður verði við minninum um teg,*
*góði babba.*
*Vit fara altíð at minnast teg. Hvíl í friði.*

**Heinina, Elisabeth og Sólbjørg**
**við familju**

# Tøkk

Hjartaliga takki eg øllum, ið mintust meg við vitjanum, gávum, blómum, telegrammum og telefonsamrøðum á 90 ára degi mínum 21. mai.

Hjartaliga takk øll somul.

**Kærar heilsanir**
**Nikal Thomsen**

**Dagurin**

**10. juni. Onuphrius**, deyður umleið ár 400. Eftir halgisøguni var hann kongssonur av Blálondum, sum gjørdist kristin, segði alt frá sær og livdi til sín doyggjandi dag sum einbúgvi í egyptisku oyðimørkini.

**11. juni. Barnabas**. Hann verður fleiri ferðir umtalaður í Ápostlasøguni, men so at siga altíð í sambandi við ápostulin Paulus. Var við á fyrstu trúboðanarferðini hjá ápostlinum. Evangelisturin Markus og hann vóru systkinabørn. Halgisøgan sigur, at hann á føðioynni Kýpros varð tikin av jødum og brendur á báli í árinum 62, halda teir. Í fornkirkjuni var hildið, at hann skrivaði Hebrearabrævið

**12. juni. Basilius**. Helst til minnis um Basilius tann Stóra, sum var biskupur í Kesarea. Hann doyði í 379.